# Danir færri nýtslulán

Danir læna færri pengar nú til nýtslulán enn fyrr. Ein uppgerð vísir, at nýtsluláninì minkaðu eina hálva milliard í síðsta ársfjórðingi í fjør, soleiðis at tey komu niður á góðar 21 milliardir um ársskiftið. Danska hagstovan sigur, at hetta er fyrstu ferð síðani 2004, at nýtsluláninì eru minkað. Steen Bocian, búskaparfrøðingur hjá Danske Bank, sigur við Ritzau, at annaðhvørt ansa danir betur eftir, hvat teir brúka pengar til, ella er tað vorðuð truplari at fáa nýtslulán.



# Meiriluti fyri hvalaveiði

Tað er líkt til, at fyrrverandi íslendski fiskimálaráðharrin, Einar K. Guðfinsson, hevði fólkið aftan fyri seg, tá hann í seinastu løtu gjørdi av at heimila íslendskum hvalabátum at veiða stórhval tey næstu fimm árini. Í hvussu er vísir ein meiningakanning, sum Gallup hevur gjørt, at 67 prosent av teimum spurdu taka undir við at taka hvalaveiðina uppaftur. 20 prosent siga nei, og 13 prosent vita ikki. Nýggja íslendska stjórnin ætlar at ógilda avgerðina hjá Einari K. Guðfinssyni ella at avmarka veiðiheimildina.

## Javnstøða í Klaksvík og í Havn

**Í kvøld verður almennur fundur í Klaksvík um javnstøðu og mánakvøldið verður fundur í Havn**

JAVNSTØÐA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Javnstøðunevndin ferðast í hesum døgum kring landið og heldur almennar fundir, har upplýst verður um javnstøðu ímillum kynini.

Endamálið við fundunum er at økja um kunnleikan til og áhugan fyri javnstøðuspurningum í føroyska samfelagnum.

Fyrsti fundurin var á Tvøroyri mánakvøldið og nú verður hildið fram við almennum fundi í Klaksvík í kvøld, áðrenn rundferðin endar við almennum fundi í Havn mánakvøldið.

Fundurin í Klaksvík verður í Atlantis Bio í kvøld og fundurin í Havn mánakvøldið verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Báðir fundirnir byrja klokkan 19.30 og báðir fundirnir verða skipaðir sum pallborðsfundur.

Men tað verður eisini høvi hjá fundarfólki at spyrja og annars at siga sína hugsan.

Johan Dahl, landsstýrismaður í javnstøðumálum verður við á báðum fundunum.

Í Klaksvík sita haraftur-at Gunvá við keldu, nývaldur borgarstjóri í Klaksvík og Annleyg Lamhauge, blaðstjóri á Kvinnu, við Pallborðið. Orðstýrari verður Solby Eliassen

Við pallborðið á fundinum í Miðlahúsinum mánakvøldið, sita Sonja Jógvansdóttir, samskipari á Samtaki og Ása Andreasen, stjóri og eigari í fyritøkuni Synergi. Orðstýrari verður Georg L. Petersen.

Johan Dahl:

# Kvinnur skulu brúka albó

**Kvinnurnar hava sjálvar ein stóran part av skyldini fyri, at javnstøðan er so vánalig, heldur landsstýrismaðurin í javnstøðumálum**

JAVNSTØÐA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Kvinnur skulu brúka albógvarnar meiri.

Soleiðis tók Johan Dahl, landsstýrismaður í javnstøðumálum turrisliga til á almennum fundi á Seglloftinum Tvøroyri mánakvøldið.

Javnstøðunevndin er farin at ferðast kring landið at halda fundi um javnstøðu og fyrsti fundurin var í Suðuroy mánakvøldið, har eini 20-30 fólk vóru møtt upp.

Á fundinum var nokk so nógv tosað um, hvussu tað ber til, at tað ikki er fleiri kvinnur frammi í vinnulívi og, ikki minst, í politikki.

Í hesum sambandi staðfesti landsstýrismaðurin, at kvinnurnar mugu taka í egnan barm, tí tær eiga ein stóran part av trupulleikanum sjálvar.



*Á almennum fundi um javnstøðu á Tvøroyri mánakvøldið staðfesati Johan Dahl, landsstýrismaður í javnstøðu, at kvinnurnar mugu taka í egnan barm, tí tær hava sjálvar ein stóran part av skyldini av, at so fáar kvinnur eru við í politikki*

Hann helt, at eitt er, at kvinnurnar eiga at gera meiri burtur úr at føra seg fram - ella brúka albógvarnar, sum hann tók til.

### Kvinnur skulu velja kvinnur

Men so er tað eisini ein veruleiki, at tað eru fáar av teimum kvinnum, sum verða uppstillaðar til, sum fáa nóg mikið av atkvøðum til at verða valdar.

Og tað var eisini á hesum øki, at bæði Johan Dahl, og onnur, hildu, at kvinnurnar sviku hvørja aðrar.

- Tá ið kvinnur ikki velja kvinnur, hvør skal so gera tað, spurdi Johan Dahl.

Hann heldur, at kvinnurnar mugu fyrst og fremst hugsa um at velja kvinnur

- At kvinnur ikki velja kvinnur í størri mun enn veruleikin vísir at tær gera, sigur nokk so nógv um, hvussu teirra hugburður er til javnstøðu.

# Klagað arbeiðsgevarar fyri at bróta

**Javnstøðunevndin fær fleiri og fleiri klagur um, at arbeiðsgevarar bróta lógina um javnstøðu**

JAVNSTØÐA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit fáa fleiri og fleiri klagur frá starvsfólki um, at arbeiðsgevarar bróta javnstøðulógina.

Tað fortaldi Kristianna Winther Poulsen, forkvinna í Javnstøðunevndini á almennum fundi, sum nevndin skipaði fyri á Seglloftinum á Tvøroyri mánakvøldið.

Hon sigur, at seinastu tíðina er tað oftari og oftari komið fyri, at arbeiðsgevarar verða klagaðir fyri at hava brotið javnstøðulógina.

Hon veit ikki, hví tað er so, at alsamt fleiri arbeiðsgevarar verða klagaðir fyri brot á javnstøðulógina.

Tað kann vera tí, at arbeiðsgevarar eru farnir at leggja minni og javnstøðulógina. Men tað kann eisini vera tí, at starvsfólk verða meiri og meiri varug við hendan møguleikan tey hava fyri at kæra um hesi viðurskiftini.

Sjálv hellir Kristianna Winther Poulsen til tann seinna møguleikan.

- Eg haldi, at vit fáa fleiri og fleiri klagur so hvørt sum starvsfólk varnast, at tey hava hendan møguleikan at kæra, tá ið tey halda, at tey eru fyri mismuni á arbeiðsplássinum vegna sítt kyn, sigur hon.

Men hon heldur eisini, at starvsfólk yvirhøvur verða meiri og meiri tilvitað um síni rættindi og finna seg ikki longur í hvørjum sum helst.

- Starvsfólk eru ikki so undirbrotlig longur, sigur hon.

Hon sigur, at enn hevur javnstøðunevndin ikki tikið støðu til nakrar av hesum kærunum, so hon dugir ikki at siga, um kærararnir fáa viðhald í, at arbeiðsgevarin hevur brotið lógina, ella ikki.

### Mest kvinnur

Kristianna Winther Poulsen sigur, kærurnar vísa, at tað í mestan mun eru kvinnur, sum føla seg verða fyri mismuni.

- Nakrar kærur eru frá kvinnum, sum siga, at tær verða sagdar upp av tí, at tær eru blivnar við barn.

- Men kærur eru eisini frá kvinnum, sum hava verið í barnsburðarfarloyvi, men sum so fáa verri treytir á arbeiðsplássinum tá ið tær koma aftur til arbeiðis, enn tær høvdu frammanundan.

Men tað eru eisini onkrar kærur frá monnum, sum halda, at teirra sømdir at fáa barnsburðarfarloyvi, eru verri enn tær hjá kvinnum.

Forkvinnan í javnstøðunevndini sigur, at tað eru bæði arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum og á almenna arbeiðsmarknaðinum, sum verða klagaðir.

### Avmarkaða heimild

Spurningurin er so, hvørjar heimildir javnstøðunevndin hevur í sambandi við tær kærur, sum koma.



Hvat kann javnstøðunevndin gera í teimum førum, har hon kemur til ta niðurstøðu, at arbeiðsgev-